

# Samkomublaðið fyri februar/mars 2016

KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar







## Halt fast í lyftunum!

Michael L. Brown

www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510



## Kletturin

*Martina B. Poulsen*

Í 5. Mós 32,4 stendur: Kletturin – fullkomið er verk Hansara; tí allir vegir Hansara eru rættferð! Trúfastur og svikaleysur Gud, rættvísur og sannorðaður er Hann

Lívið okkara er sum ein ferð. Vit føðast í henda heim, vaksa og mennast. Fyrst er man barn. Síðan tannáringur. Tá man er tannáringur, gleðir man seg til at blíva vaksin. Sum vaksin sær man, hvussu skjótt lívið gongur. Alt gongur við nógvari ferð. Hjúnaband, familja, og man kann gleðast um børn og barnabørn. Men áðrenn man veit av, so er lívið meira enn hálvrunnið, og børnini flogin úr reiðrinum og langt av landi skotin. Men hvat tað tá er gott at kunna samskifta við síni kæru gjøgnum facetime, skype og snapchat.

Frá Skaparans hond eru vit skapt til at hava samskifti við hvønn annan.

Gud hevur skapt okkum so undurfult. Hann ynskir, at vit hava samskifti við Hann. Hann leingist eftir at hoyra frá okkum. Líka so nógv, sum vit sakna okkara kæru, tá tey eru burturstødd, líka so nógv saknar Hann teg og meg. Hann hevur umsorgan fyri tær. Ja, tú spyrt kanska, hví mær. Tí Hann elskar øll menniskju.

Eg havi valt at fylgja Jesusi. Hann er mín klettur mín vón og mítt álit. Lít á Harran av øllum hjarta tínum, men lít ikki á vit títt! Orðt. 3,5.

Ein starvsfelagi hevur júst yrkt ein sang um hesa vónina, ið vit eiga, ið eru Hansara børn. Havi fingið loyvi frá Signar á Reynatrøð at brúka sangin her.

Vónin er:

1. Vónin er mín morgunsálmur, vónin er mín takkarbøn. Vónin er mín frelsuhjálmur, vónin er mín himmalløn.

Frelsari takk fyri vón fyri framman, takk fyri ljósið, tá myrkt var um nón. Hjálp mær at síggja bert teg – ongan annan. Takk fyri frelsu og uppreisnarvón.

2. Vónin er mín andadráttur, vónin er mítt hjartamál. Vónin er mín hjartasláttur og at eiga frelsta sál.

3.Vónin er við vón at sáa, vónin er eitt ævigt vár. Vónin er við vón at heysta, vónin er mítt faðirvár.

Gott at eiga hesa vón í øllum lívsins viðurskiftum og at kunna leggja alt í Hansa hendur.

# Skrá fyri februar/mars

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 15. febr. | kl. 19.00: | Felags bønarmøti í Kelduni (fríkirkjunetverkið) |
| Týsdagur | 16. febr. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 17. febr. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| | | kl. 18.00: | Leiðarakveiking við Sam Jakobsen |
| Leygardagur | 20. febr. | kl. 20.00: | AWAKE við Keldu-veteranum |
| Sunnudagur | 21 febr. | kl. 11.00: | Ymisk luttøka, frá leguni 45 + Sangluttøka: Oasubrøðurnir |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 22. febr. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 23. febr. | kl. 10.00: | bønardagur |
| Mikudagur | 24. febr. | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Hósdagur | 25. febr. | kl 10.30-13: | Mammukafé |
| Leygardagur | 27. febr. | kl. 20.00: | Eitt øðrvísi AWAKE |
| Sunnudagur | 28. febr. | kl. 11.00: | Felags møti við Stephen Moses (Lívsins Orð og Keldan) |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 29.febr. | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 1. mars. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 2. mars | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Leygardagur | 5. mars | kl. 20.00: | AWAKE við Ingibjørn Royðutoft |
| Sunnudagur | 6. mars | kl. 11.00: | Morgunmøti við Paula Høj. Børn hava sangframførslur<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 7. mars | kl. 20.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 8. mars | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 9. mars | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| Hósdagur | 10. mars | kl. 10.30-13: | Mammukafé |
| Leygardagur | 12. mars | kl. 20.00: | AWAKE við Rúna Rasmussen<br>Evni: Breyðbróting |
| Sunnudagur | 13. mars | kl. 11.00: | Morgunmøti við Jonnu Heinesen og Alice Frederiksberg<br>Sangframførsla við Jansy Frederiksberg |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 14. mars | kl. 20.00: | Bønardagur |
| Týsdagur | 15. mars | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Mikudagur | 16. mars | kl. 17-20: | Kaféterian er opin |
| | | kl. 18.00: | Leiðarakveiking við Sam Jakobsen |
| Leygardagur | 19. mars | kl. 20.00: | AWAKE við Eivind Frøen |
| Sunnudagur | 20. mars | kl. 11.00: | Morgunmøti við Eivind Frøen |

# Lýsingar

**Lega 45+**

Spennandi lega verður í Kelduni 19.-21. februar Tey elstu í ættarliðnum, sum fekk visiónina um at byggja Kelduna og sum løgdu alla orku í at gera hetta til veruleika, fara nú at eldast, og tey, sum vóru tannáringar, tá samkoman var stovnað, eru nú vorðin 45+.

Áhugavert verður at koma saman og gleðast um tað, sum er hent og søkja Gud um, hvussu ung og eldri áhaldandi kunnu vera saman í tænastuni í einari slíkari tíð sum hesari. Vit bjóða okkum fram at hava ungdómsmøtið leygakvøldið og eisini sunnudagsmøtið, har Oasubrøðurnir luttaka við sangi saman við okkum.

Vónandi verður luttøkan góð. Legan kostar 200 kr. Tey, sum sova í Kelduni, verða biðin at taka lak, dýnu og koddavár við. Møtast fríggjakvøld kl. 18:30. Nátturði verður kl. 19. Seinasta freist at tekna seg er 15. februar. Tilmelding á keldan.fo.

**Felags møti - Lívsins Orð og Keldan**

Tað er Lívsins Orð sum hevur eina vitjan, har vit so hava eitt felags møti sunnudagin 28 februar kl. 11.00. Luttøka: Transforming Nations for Jesus við Pastor Stephen Moses. Hann er eisini er virkin í DK Troens Ord.

**Eivind Frøen í Kelduni  og páskastevna**

Eivind Frøen vitjar í Kelduni vikuskiftið áðrenn páskirnar (19. og 20. mars).

Eivind Frøen er í Føroyum í samband við páskastevnuna, sum verður í Oasuni í Havn. Eivind er høvuðstalari. Latum okkum eisini bakka upp um hesa páskastevnu, sum skiftir ímillum Oasuna og Kelduna. Vit hava eingi møtir á páskum vegna stevnuna, sum verður í Oasuni.

**Dreingjabólkur**

Farið verður undir at gera ein dreingjabólk, um áhugi er fyri tí. Hesir ynskja at seta tíð av til at møtast sum ein húsbólkur. Ynskiligt er at geva andaliga vegleiðing og svar uppá viðkomandi spurningar, at styrkjast og mennast í okkara trúgv og samskifti við aðrar dreingir. Ert tú áhugaður, ert tú millum 14 og 18 ár, vil eg fegin frætta frá tær á Facebook ella tlf.772033. Maibritt Frederiksberg.

**Leiðarakveiking**

Farið er undir at hava leiðarakveiking. Sam Jakobsen undirvísir úr Havn. Byrjað verður kl. 18.00 við ábiti, og síðan verður farið í lítlasal til undirvísing.

Hesar dagar savnast vit: 17. februar, 16. mars og 13. apríl (mikukvøld).

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592

Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606

Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584